# Mentanarnáttin

## fríggjadagin 5. juni



### Heðin Mortensen, borgarstjóri:

## *Vælkomin í føðingardag*

Tórshavnar hátíðarheldur í ár 100 ára føðingardagin hjá kommununi, og tí er skráin fyri Mentanarnáttina serliga stór í ár. Mentanarnáttin byrjar um morgunin, og heldur fram til út á náttina. Hendan dagin hendir nógv ymiskt, og skráin býður uppá okkurt til hvønn góma. Listaframsýnginar eru mest sum á hvørjum horni, tónleikur í sjangrunum frá kórsangi til rokk, túnafótbóltur og sum nakað heilt sjáldsamt er Amtmansgarðurin opin fyri alemenninginum. Hetta er nakað av tí, borgarstjórin í Havn hevur sett sær fyri at vitja Mentanarnáttina.

– Ongum noyðist at keða seg Mentanarnáttina. Vørumerkið á skránni er merkt av góðsku og hugna, og mítt ynski er, at øll skulu kenna seg vælkomin á Mentanarnáttina í Havn. Eisini borgarar uttan fyri Havnina, skulu kenna seg vælkomnan í 100 ára føðingardag hjá Tórshavnar kommunu, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.




Hugsar tú um frælsi og smidleika – við MasterCard hevur tú møguleikan. Kortið til húskið og fyritøkuna.




SUÐUROYAR SPARIKASSI

SENDISTOVAN